


*Nr. 17* *23. august 2015* *75. árg.*

# Tosti eftir Gudi

*Sál mín tystir eftir Gudi, eftir tí livandi Gudi. Sálmur 42,3.*

Er Gud til? Hvussu kunnu vit vita, um Gud er til? Felags fyri øll menniskju er tann tilvitaða ella ótilvitaða kenslan av, at til er okkurt, sum er størri enn vit; tað er ein máttur, sum stýrir, hóast vit ikki duga at fáa greiði á tí. Menniskjan er ein hjálparleysur skapningur, sum leitar eftir einum friðskjóli. Tí verða altar bygd; ein má hava okkurt at leggja seg á knæ fyri, einum ókendum gudi, eini hægri veru, eini forsjón, ella hvat tað nú verður rópt.

Men Gud býr í einum óatkomiligum ljósi, og ongin hevur á nøkrum sinni sæð Gud. Hóast upplýsingin mennist við risafetum, gongur mannaættin í myrkri við óttanum í hølunum. At nokta fyri hesum ber boð um hugmóð og grunnskygni. Sannleikin um okkum er, at vit sita í myrkri og deyðans skugga.

Við nóg mikið av doyvingarevni ber til at skipa seg so nøkulunda væl í hesum myrkri. Óivað eru tey mong, sum hvørki eru órólig ella strongd, men hava góðtikið, at soleiðis er tað bara, og soleiðis má tað vera. Fólki, sum livir í núinum, leingist ikki. Tað óttast ikki, spyr ikki, hugsar ikki.

Men tann, sum í álvara spyr og viðgongur neyðarrópið: “Sál mín tystir eftir Gudi, eftir tí livandi Gudi!” kann fáa svar. Ongin hevur á nøkrum sinni sæð Gud, men Gud hevur givið seg til kennar. Gud talar og tolkar fyri okkum tað, sum vit neyðturviliga mugu hava at vita, um hjartað skal gerast nøgt.

Gud kemur til okkara. Tað er undrið fram um øll undur. “Eg eri tann, eg eri,” sigur hann. “Eg veit, hvør tú ert, og eg veit alt um teg.

Men vita skalt tú, at tú ert fevndur av kærleika mínum. Um tú trýrt mær, skal ljós mítt bróta ígjøgnum myrkur títt.”

Gud er faðir Várs Harra Jesu Krists og okkara faðir, og bara tí skínur ljósið fyri okkum, sum sita í myrkri og skugga deyðans. Tað lýsir fyri degi, tí Jesus livir

*Mítt ljós í myrkri Jesus Krist,*
*mítt lív mítt skjól, mín innivist,*
*á fold ein gestur eri eg,*
*at føðurhúsum lystir meg,*
*men brøtt og drúgv tann ferðin er,*
*sum meg at lívsins landi ber.*

*Har liva tey, mær varða av,*
*men er oss millum deyðans hav,*
*so vilt og øgiligt at sjá,*
*at ísakalt tað kennast má*
*í hjarta og í blóði mær,*
*tá ferðin langa sýnist nær.*

*Í ørmakt fellur hvør, ei fær*
*á vegi ferðarbreyð frá tær,*
*bert tann, tú veitir stav og ljós,*
*man finna fram á rætta kós;*
*í holt við deyða stendst bert hann,*
*ið frið við blóði tínum fann.*

# Tá ið kreppan nívir

**Kristina Zorba Jensen**

Sum vit ganga fram gjøgnum lívið, renna vit øll okkum í umstøður, har vit onga loysn síggja. Vit halda, at dagurin er ov stuttur at náa tað, vit skulu náa. Ella vit hava skeldast við okkara hjúnafelaga. Ella at bunkin við teldubrøvum verður størri og størri. Ella høvdið er um at bresta av trupulleikum. Ella tú hevur verið í Keypsamtøkuni tvær ferðir og gloymir at keypa mjólk hvørja ferð. Ella tú hevur fólk uttan um teg, sum tað er ógjørligt at gera nøgd. Ella at sjúka rakar aftur og aftur. O.s.fr.

Alt hetta er ein partur av okkara gerandisdegi, og soleiðis er tað bara. Tí vit eru menniskju og sleppa ikki undan slíkum. Men hvussu royna tú og eg at loysa trupulleikar í lívinum, tá ið kreppan nívir?

Eg hugsi ofta um hesar persónar: - Hvussu heldur tú, at Móses hevði tað, tá ið hann stóð framman fyri Reyða Havinum við øllum fólki sínum, og fíggindin var beint í hølunum? - Hvussu heldur tú, at Dánjal hevði tað, tá ið hann varð blakaður fyri leyvurnar? - Hvussu heldur tú, at teir tríggir vinmenn Dánjals høvdu tað, tá ið teir vórðu blakaðir í ovnin? - Hvussu heldur tú, at Jósef hevði tað, tá ið egnu brøður hansara blakaðu hann í ein brunn og síðani seldu hann? - Hvussu heldur tú, at Maria hevði tað, tá ið hon fekk boð frá einum eingli, at hon skuldi hava barn, sum skuldi verða heimsins Frelsari? Og hon hevði ikki verið saman við manni sínum.

Eg haldi, at tey øll hava kent seg ógvuliga lítil. Kanska hava tey verið so kroyst. at tey bara ynsktu, at lívið mátti endað. Men nei! Trúgv, vón og álit á Gud reisti seg í teimum øllum. Tey vistu hóast ringu umstøðurnar, at tey bóru okkurt í hjartanum, sum eingin fekk tikið frá teimum. Heldur ikki umstøðurnar kundu taka trúnna og lívið í Gudi frá teimum.

Tey vistu, at tá ið Gud var við teimum, so kundi eingin vera ímóti teimum! Tey vistu, at tá ið Gud hevði talað, so virkaði hann eisini! Tey vistu, at mitt í øllum hevði Gud tamarhald á støðuni! Tey vistu, at hóast ódnin leikaði í, so fór Gud at blíðka stormin! Tey vistu, at uttan mun til, hvat ið tey máttu fara ígjøgnum, og uttan mun til, hvat ið teirra høvd segði teimum, so var tað týdningarmikið at varðveita hjartað fram um alt annnað. Tí gjøgnum hjartað sprettur trúgvin og lívið!

Tey vistu, at sjálvt um 10.000 reistu seg á aðrari síðuni, og 10.000 reistu seg hinari síðuni, so reisti Gud seg fyri tey og var við teimum! Tey vistu, at sjálvt um tey gingu gjøgnum dal deyðaskuggans, so høvdu tey einki at óttast! Hóast umstøðurnar søgdu tey: “Gud er mín skjøldur og mín borg, eg líti fult og fast á teg, mín Gud!” Tey vistu, at Gud er ein góður og trúfastur Gud í øllum lívsins viðurskiftum.

Eg vóni eisini, at tú og eg vita, at Hann er hin sami Gud og Faðir fyri teg og meg, tá ið vit uppliva stríð og kreppur í lívinum.

*Effie Campbell* umsetti.

# Lívsins krúna

Lívsins krúna er heiðursprógv Guds til hitt frelsta menniskjað. Ævinleikin er fagnaðardagur okkara.

Tó fer ein kensla at takast í sálini: heiðrað(ur)? – eg? Og so taki eg krúnuna av enninum og leggi hana fyri føtur Guds og sigi: *"Verdur ert tú, Harri og Gud okkara, at fáa dýrdina og heiðurin og máttin, tú hevur skapað allar lutir, og fyri vilja tíns skuld vórðu teir til og vórðu skapaðir."* (Opb. 4,11).

Men krúnan verður tó ikki liggjandi har, tí soleiðis var hon ikki ætlað. Harrin tekur hana upp, og við fagrasta eymleika setir hann hana um enni mítt og sigur: "Rætt hevur tú! Nú ið tú ert frelst(ur) og komin heim, so er tað ikki tín heiður. Men her í himmalinum skalt tú læra at skilja eitt orð, sum tú so mangan hevur hugsað um, og sum tú kanska viðhvørt ikki skilti: ***náði!"***

Og so vísir hann mær enni sítt, og á tí eru djúp arr. Tá minnist eg tornakrúnuna! Sum eg standi krýnd(ur), skilji eg sáttargerðargátuna. Eg skoði djúpari. Nú síggi eg hann sjálv(ur): Jesus Krist – menniskjusonin – lambið.

Av sonnum: hann krýnir meg við miskunn!

*t.* týddi.

---

Einaferð var tað ein, sum spurdi: "Hvat skal eg gera fyri at verða frelstur?" Svarið, hann fekk, var hetta: "Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt."Áps. 16,30-31.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 23. aug. | Tekstur: | Jóh. 2,1-12; | bíbliuorð: | Matt.19,26 |
| 30. aug. | Tekstur: | Mark.10,46-52; | bíbliuorð: | Mark.10,49b |
| 6. sept. | Tekstur: | Luk .7,11-17; | bíbliuorð: | Luk.7,22b |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta, 35 77 74




***Nr. 18*** ***6. september 2015*** ***75. árg.***

# Bein spor

*Stígið bein spor við fótum tykkara. Hebr. 12,13.*

At fótafetini avdúka lívsleiðina, er greitt. Mátin, sum vit taka ímóti lívsins gávum og bera dagsins byrðar, avdúkar, hvørjum máli vit stevna ímóti. Okkara dagligi verumáti mótvegis teimum, vit koma saman við, fortelur hvørji lóg, vit eru heft at. Vit eru ávegis og stíga spor, og tá ið ferðin er komin at enda, avdúka fótasporini, hvønn veg vit valdu at ganga. Hetta er galdandi fyri okkum øll.

Stígið bein spor. Tað gera tey trongskygdu. Tey fara harðliga trampandi frameftir og leggja líka í, um tey traðka onnur niður ella skumpa tey til viks. Tey vita, at stytsta leiðin millum tvey støð er tann beina linjan. Beint fram og harðliga er teirra slagorð, og kostnaðurin er stórur.

Leiðin hjá teim kristnu er mangan vinglandi og víkjandi. Ein dag herja tey bergtikin frameftir, og dagin eftir lata tey mótleys hendurnar falla í mistreysti. Í ferðalagi við sínum samsintu nýta tey stór orð, men verða tey kroyst, víkja tey undan. Leiðin er ikki heilt sjónlig, og ikki verður gingið eftir beinu linjuni.

Stígið bein spor. Skal tað eydnast, er umráðandi at vera ansin. Tú mást hava eyguni við tær. Mangar vanlukkur hendu í tankaloysi. Eitt hvast óumhugsað høgg. Soleiðis verða vit tikin út av kós. Ansni er treytin fyri at stíga bein spor.

Tak bara smá fet, tað ger onki; men tú gert rætt í at byrja hvønn dag í bøn um, at tað undir øllum viðurskiftum má eydnast tær at stíga bein spor. Smá fet eftir beina vegnum. Í

egnari megi klára vit tað ikki, men í lívssamfelagi við Kristus ber tað til. Lýðin til deyða steig hann bein spor. Hann vil halda fast í okkum, um vit halda út á vegnum heim – við smáum fetum eftir beina vegnum.

*Eg veit ein veg til heimið gott,*
*og hagar til vit koma skjótt.*
*Ov langa tíð her livdi eg*
*og kendi ikki henda veg.*

*Mítt mál tað er nú himmalin,*
*har Jesus bjóðar sínum inn.*
*Hoyr, vinur, vilt tú koma við?*
*Á veg' hans hava hjørtu frið.*

# Ein livandi vón

Tíðliga í 1920-unum varð Nikolai Bukharin sendur úr Moskva til Kiev at tala á einum gudloysisfundi. Í ein heilan tíma gjørdi hann gjøldur burtur úr kristnu trúnni, líka til hann helt, at grundarlagið undir kristindóminum var smokkað saman.

Nú varð orðið givið frítt at koma við spurningum og viðmerkingum. Ein prestur í ortodoksu kirkjuni fór á føtur og bað um orðið. Hann vendi sær móti fólkinum og bar fram gomlu, russisku páskaheilsanina: "Kristus er risin upp." Beinanvegin fór alt fundarfólkið á føtur, og svarið kom, sum tá ið ein stór alda brestur móti berginum: "Ja, hann er sanniliga risin upp!"

Job, ein kendur maður úr Gamla Testamenti, mundi hava verið freistaður at gerast gudloysingur. Líðingarnar, honum vóru fyri, vóru ómenniskjaligar. Men hann varðveitti trúnna á tann livandi frelsaran og orðaði seg soleiðis: "Men eg veit, at loysnari mín livir, yvir dustið skal málsmaður rísa upp." (Job. 19,25).

---

Jesus segði, at tá ið hveitiakurin var aksaskotin, TÁ kom eisini illgresið til sjóndar. Matt. 13,26. Tá ið vekingin er um at bróta út, tá reisast allar myrkursins maktir at berjast ímóti.

*e.c.* ums.

# Tíggjund

*”Síðani menn fóru aftur at lata offuravskurðin til hús Harrans, hava vit etið okkum mettar og havt nógv til avlops, tí at Harrin hevur signað fólk sítt, so at øll henda nøgdin er til avlops hjá okkum!”*

*2. Krýn. 31,10.*

Tað er skeivt at steðga við at geva til Gud, tá ið tíðirnar eru ringar. Meðan hungursneyðin valdaði, gav fátæka einkjan Eliasi, Guds tænara, tað sindrið, hon hevði. Hvat spurdist burtur úr tí? ”Bæði hon og sonur hennara høvdu nóg mikið at eta í langa tíð.” 1. Kong. 17,15.

Dr. Norman Vincent Peale var ungur prestur, tá ið stóra fíggjarkreppan herjaði. Tvær ferðir skerdu teir løn hansara. Hann sigur: ”Øll vóru bangin og døpur í huga. Handilsfyritøkur fóru av knóranum. Eingin fekk lænt pengar. Trýstið vaks, og fyri fyrstu ferð var eg ræðslusligin. Eg segði við konu mín: ”Vit eru í einari ræðuligari støðu. Vit fáa ikki goldið okkara rokningar: Hvat skulu vit tó gera?” Eg gjørdist bilsin av svari hennara: ”Vit skulu fara undir at lata tíggjund!” Eg segði: ”Við hvørjum? Tað er ógjørligt.” – ”Ikki ógjørligt,” segði hon, ”tað er sera umráðandi. Vit mugu royna at liva fyri 90% av tínari løn. At lata tíggjund er ein trúargerð, og um vit hava trúgv so stóra sum eitt sinnopsfræ, fer einki at vera ógjørligt.”

Hon hevði rætt. Vit megnaðu tað. Pengarnir streymaðu ikki inn; men vit høvdu altíð nokk. Harumframt var tað, sum at hetta at gjalda tíggjund doyvdi mín ótta og lívaði meg upp. Ein ósjónlig goymsla við yvirflóð letur seg upp, tá ið tú aktar Guds lóg.” Bíblian sigur: ”Harrans signing, tað er hon, ið ríkar, og egin møði leggur einki aftrat.” Orðt. 10,22.

Guds signing er ikki bundin av tíni fíggjarstøðu. Um tú ærir hann við tínum tíggjunda og tínum gávum, so sigur Harrin: ”… tá lati eg himinsins lokur upp og ríkliga helli út signing yvir tykkum. Roynið meg við hesum.” Mál. 3,10.

Tá ið fólkini í Gamla Testamenti fóru undir at bera teirra gávur til templið, søgdu tey: ”Øll henda nøgdin er til avlops.” 2. Krýn. 3,10. Hví? Tí Harrin hevði ”signað fólk sítt.”

Vilt tú vera bundin av menniskjansligari fíggjarstøðu ella av Guds signingum? Valið er títt.

“... et Ord til Dagen”
*Effie Campbell* umsetti.

# Himmalin

*Tí at lívið er mær Kristus, og deyðin ein vinningur. Fil. 1,21.*

Tá ið Bíblian talar um himmalin, talar hon í myndum. Myndirnar lýsa himmalsku dýrdina fyri okkum. Tær geva okkum ein varhuga av, hvat ið bíðar Guds børnum. Gud hevur givið okkum myndirnar, at vit skulu líta at teimum og gleðast um tær og soleiðis fáa eitt sinni, sum gerst meira himmalvent og loyst frá hesi fold.

Men meðan vit líta at hesi dýrd, skulu vit vita, at har er uppaftur dýrdarríkari – ja, nógv dýrdarríkari enn nakað hugflog megnar at lýsa.

Tað er vandamikið hjá okkum  at seta alla vón okkara á okkurt, sum vit skulu gleða okkum við í hesum lívi, tí so gerast vit lættliga vónbrotin.

Men tann dagin, tá ið vit standa á ævinleikans gátt, og himmalsins undurfagra ljóshav stendur bjart í eyguni, tá gerast vit bæði ovfarin og yvirtikin. Hitt lítla brotið, sum vit høvdu sæð av himmalsins dýrd, meðan vit vóru á hesi fold, er sum eitt einsamalt jólaljós, móti jólatræsins glógvandi skrúði.

*t.* týddi.

---

Einaferð var tað ein, sum spurdi: “Hvat skal eg gera fyri at verða frelstur?” Svarið, hann fekk, var hetta: “Trúgv á Harran Jesus, og tú skalt verða frelstur og hús títt.”Áps. 16,30-31.

*e.c.* ums.

---

**Sunnudagsblaðið** er nú eisini at finna á alnetinum á føroyskum, donskum og enskum. Sigið skyldfólki og vinum í útlondum frá hesum.
Adressan er: **www.jesus4all.dk**

---

## SUNNUDAGSSKÚLIN

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 6. sept. | Tekstur: | Luk.7,11-17; | bíbliuorð: | Luk.7,22b |
| 13. sept. | Tekstur: | Matt. 6,9 og Jes. 6,1-7; | bíbliuorð: | Fil. 4,6 |
| 20. sept. | Tekstur: | Matt. 6,10a og 13,4-9+19-23; | bíbliuorð: | Mark. 1,15a |

Útgevari: Hin kirkjuliga heimamissiónin í Føroyum.
Blaðstjóri: Karl N. Hansen, Torvheyggur 19, Tvøroyri.
Repro- & prent: Prenta,  35 77 74